

## Dagrøktarar til Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir dagrøktarum at byja 1. september ella eftir avtalu.

**Vit bjóða**
- eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv
- eina dagrøktarskipan í støðugari menning
- hollan stuðul frá dagrøktarskipanini

**Vit vænta**
- at umsøkjarin hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum
- at tú ert før/ur fyri at skapa umstøður, so barnið fær møguleika fyri fjølbroyttum mennandi upplivingum
- at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við foreldur, starvsfelagar og leiðslu

**Umstøður**
Fyri at hava børn í dagrøkt er neyðugt, at hølini, har børnini verða ansað, eru væl egnað, og at møguleikar eru fyri at børnini kunnu spæla úti undir tryggum og avbjóðandi umstøðum.

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í samband við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. august 2006.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Joan Simonsen, dagrøktarleiðara (214048) ella Sólvá Sondum, varaleiðara (214049) tlf. 302010.

Sosialurin 341800

**Tórshavnar kommuna**

## Í læru sum advokatskrivari ?

Advokatfelagið við Strond 4 søkir eftir næmingum at læra til advokatskrivara.

Sum næmingur á Advokatfelagnum fært tú eina ástøðiliga og praktiska útbúgving á eini skrivstovu, ið hevur bæði føroysk og útlendsk viðskiftafólk.

Tú kemur at arbeiða tætt saman við advokatunum á skrivstovuni. Arbeiðið gevur stóra ábyrgd, og tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava áhuga í at veita okkara viðskiftafólki góða tænastu.

Arbeiðið á skrivstovu okkara krevur góðan kunnleika til mál, og tú skalt duga væl at skriva.

Ástøðiligi parturin fer fram á advokatskrivaraskúla í Danmark.

Fyri at koma í læru sum advokatskrivari skalt tú hava eina miðnámsútbúgving.

Áhugað kunnu senda eina umsókn við próvskjølum og møguligum viðmælum innan 15. august 2009.

Sí annars heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 · Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

## Dámar tær at vera við til at menna og byggja upp? Føroya Studentaskúli og HF-skeið søkir fíggjarfulltrúa.

Á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði er eitt spennandi starv sum fíggjarfulltrúi leyst at søkja. Alt miðnámsskúlaøkið í Føroyum stendur fyri stórum umskipanum, og í hesum sambandi er Føroya Studentaskúli og HF-skeið í ferð við at menna sín innanhýsis bygnað og sínar visiónir fyri at kunna møta teimum nýggju avbjóðingunum.

**Uppgávur:** Fíggjarfulltrúin er ein stápsfunktión, sum skal stuðla leiðslu og umsiting skúlans, og arbeiðir tætt saman við rektaranum. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum (neyvari starvslýsing kann lesast á www.hoydalar.fo).

**Førleikakrøv:** Hægri útbúgving (Master ella bachelor) innan búskap, fyrisiting og/ella fíggjarstýring ella tilsvarandi útbúgving og royndir. Vit vænta, at tú hevur góð evni at seta teg inn í nýggj viðurskifti, hevur góð samstarvsevni og gott innlit í nútíðar amboð til starvsfólka-, fíggjar- og lønarumsiting. Vit vænta harumframt, at tú eisini hevur førleika at geva eitt íkast til arbeiði okkara at menna skúlan sum organisatión.

**Umsóknarfreist o.a:** Umsóknir skulu vera í skúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 20. august. Umsóknin saman við prógvum og møguligum ummælum verður at senda til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, 188 Hoyvík ella á t-post adressuna skrivstovan@hoydalar.fo .

Meira fæst at vita um starvið við at fara inn á heimasíðu okkara www.hoydalar.fo ella við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, á telduposti mikkjal.helmsdal@skulin.fo, telefon 312973 ella fartelefon 218404.

# EYSTUROYAR BETONG

- grundir
- dekk
- múrar
- trappur
- garðar
- tún

o.a. betongarbeiði væl úr hondum greitt fyri kappingarførar prísir. Tilboð verða givin

**TELEFON 56 20 70 / 56 20 71**

# SKEIÐ

## TRUKKUR
Trukkskeið B

Skeið byrjar í Tórshavn mikukvøldið 12. aug. kl. 19:15

## KRAN D
Lastvognsásettur krani 8-25 tonsmetur

Skeið byrjar í Tórshavn mikukvøldið 26. aug. kl. 19:15

Tilmelding á tel. 21 62 22

Vinnukortið



**Vørubilur til leigu til virkið**

**Manglar virkið hjá tær ein vørubil, men ætlar ikki at keypa ein bil, so er ein góður vørubilur til leigu her!**

Verður bilurin leigaður í longri tíð, kunnu vit hjálpa við at setta reklamu merkir uppá bilin!

Alt vanligt brúk er við í prísinum s.s. trygging, oljuskift og dekk, sum so er tað bert diesel oljan ið virkið hjá tær skal gjalda!

Prísur 1.600,00 + mvg per viku
*(Eyka trygging kann teknast).*

**Ring til**
**Heðin 210710**